22. mars 2004

# ÍD 1/2003 ÍF-flogbóltur móti Drátti (kæra frá dómsnevnd FBF)

(1) Ítróttadómstólurin (ÍD) sigur henda dóm í málinum ÍD 1 /2003ÍF-flogbóltur (ÍF) móti Drátti, sum er kæra um avgerð í dómsnevnd Flógbóltsambandsins (FBF).

(2) Ítróttadómstólurin var samdur í niðurstøðuni. Kári á Rógvi, fremsti ítróttadómari, skrivaði dómsúrslit (4) og grundirnar hjá ÍD (6-21). John Kjær, Eyðhild Skaalum, Anna Dam og Anja Hovgaard, ítróttadómarar, tóku undir við hesum grundgevingum.

(3) ÍF sendi 6. november 2003 ÍD kæru. ÍF kærdi um avgerð hjá kappingarnevndini hjá flogbóltsambandi Føroya (FBF) (tikin 13. oktober 2003) og úrskurð hjá Dómsnevnd FBF (sagdur 29. oktober 2003). ÍF legði upprunaliga málið fyri FBF 9. oktober 2003, har ÍF bað FBF taka avgerð um støðuna hjá einum spælara, vísandi til grein 8 a. og grein 8 d. í kappingarreglunum hjá FBF.

(4) **Ítróttadómstólurin heldur, at týðandi mistøk eru gjørd í málsviðgerðini bæði í kappingarnevnd FBF og dómsnevnd FBF. Ítróttadómstólurin heimvísur tí málið til nýggja viðgerð í dómsnevnd FBF, ið skal taka støðu til kærupunktini viðvíkjandi grein 8 a. og grein 8 d. í kappingarreglunum hjá FBF.**

(5) ÍD hevur havt tríggjar fundir í málinum. ÍD sendi tvey skriv til partar og stovnar. ÍD fekk skriv frá ÍF, Drátti og FBF í málinum. Skriv kom frá dómsnevnd FBF eftir at málið var liðugt viðgjørt á fundi. Eisini kom skriv frá Drátti okkum í hendi eftir at málið var liðugt viðgjørt á fundi. ÍD gjørdi síðani málið av skrivliga.

(6) ÍD hevur sambært Evstulóg ÍSF grein 15 og 16 dómsmyndugleika sum nærri fyriskipað í lógum hjá ÍSF og sersambondunum. ÍSF hevur samtyktar "Reglur fyri dómsnevndir innan ÍSF og viðgerð av kærum." Eftir 10. grein í hesum reglum kunnu avgerðir hjá dómsnevnd ikki broytast av øðrum enn Ítróttadómstóli ÍSF. FBF hevur ikki nakrar reglur, ið avmarka støðuna hjá ÍD.

(7) ÍD skal ikki taka støðu til øll mál, ið verða reist í sersambondunum. ÍD skal ikki viðgera ella meta av nýggjum tey mál, har stovnarnir hjá sersambondunum hava útint sín lut eftir teirra egnu lógum. Sum sagt verður í Evstulóg ÍSF "Ítróttadómstólurin viðgerð í kappingarmálum og kærumálum einans spuringar um lóg og mannagongdir, ikki próvspurningar." Í hesum liggur, at ÍD ikki eftirmetir lýsingar av faktum, *men heldur roynir ella eftikannar ta fatan av lóg og mannagongdum, sum lægru stovnarnir hava brúkt.*

(8) Afturfyri *skal* ÍD taka støðu til almennar og prinsippiellar spurningar, slíkt sum fær týdning fyri framtíðar mál og sum kann vegleiða bæði ítróttafólk og ítróttastovnar av ymsum slagi.

(9) Málið snýr seg um støðuna hjá Nikolinu Alter, ið hevur verið limur fyrst í ÍF og síðani Drátti. Nikolina Alter kom til Føroya sum útlendskur spælari at spæla við ÍF sambært sáttmála frá 2 mai 2003. Nikolina Alter valdi tó seinni at spæla við Drátti í staðin.

(10) Ósemjan í málinum snýr seg um reglur og siðvenjur viðvíkjandi leikaraskifti: hvussu og nær leikari kann flyta felag, og hvussu fíggjarliga tá skal gerast upp millum gamla felag, nýggja felag og leikara. Við øðrum orðum: nær kundi Nikolina Alter leika fyri Drátt, hvussu leingi kundi ÍF forða henni í tí, eftir hvørjum reglum ella mannagongdum skuldi pengaliga gerast upp, og hvussu nógv skuldi hvør partur gjalda?

(11) ÍF bað FBF taka støðu til hesar spurningar, fyrst í einum telduposti (30. september 2003) og síðani í skrivi 9. oktober 2003. ÍF vísir til grein 8 punkt a í kappingarreglunum hjá FBF (leikari skal hava verið limur í ein mánað í tí felag, sum hann luttekur fyri) og førir fram: "vanlig mannagongd tá leikari flytur frá einum felag til annað, hevur altíð verið, at felagið, ið leikari flytur frá, skal góðkenna flytingina... ÍF F logbóltur metir seg sostatt framvegis hava sáttmála við NA." ÍF vísir eisini til grein 8 punkt d (felag kann nokta leikara at flyta, um felagið metir at peningalig ella onnur felagslig áhugamál binda leikaran) og førir fram grundgevingar fyri meting síni. Skrivini bæði frá ÍF eru greið og helst nóg góð sum grundarlag fyri nærri støðutakan.

(12) FBF svaraði at síggja til einans við einum telduposti, dagf. 13. oktober 2003. Hetta tykist vera sjálv avgerðin hjá FBF ella kappingarnevnd FBF, sum upprunaliga varð kærd til dómsnevnd FBF. Hesin teldupostur tekur sera summariskt støðu til málið. Fyrst stendur "Sum áður upplýst sendi eg her niðurstøðu viðv. grein 8d í kappingarreglunum við máli um Ninu" Síðani verða ásettar nakrar upphæddir fyri leigu og løn. Teldubrævið endar við setninginum "+ dokumenteraðar ferðaútreiðslur hjá Ninu".

(13) Vit ásanna, at sersambondini hava avmarkaða orku til slíkt arbeiði, men meta at tað er ikki nøktandi, at einans partar av áheitanini hjá ÍF verður svaraðir. ÍF greiddi í skrivi sínum frá, hvørjar spurningar felagið vildi hava prinsippiella støðu tikna til. ÍF vísti á bæði spurningin um nær leikari kundi sigast vera fluttur frá einum felagi yvir í annað, og hvørjar heimildir fyrra felagið hevði at nokta leikara at flyta; spurningurin um fíggjarliga uppgerð var ikki einasti spurningurin hjá ÍF. FBF hevði fingið til vega eitt úttalilsi frá advokati um hetta mál, men tekur kortini ikki, tað vit hava fingið upplýst, støðu til teir viðkomandi og prinsipiellu spurningarnar, sum ÍF reisti. FBF greiðir heldur ikki frá, hvussu fíggjarliga uppgerðin skal fara fram, og FBF tekur ikki endaliga støðu til faktum, serliga hvussu stórar ferðaútreiðslurnar vóru.

(14) Vit halda tí, at FBF ella kappingarnevnd FBF hevur mistikið seg týðandi í málsviðgerðini.

(15) ÍF kærdi hesa avgerð inn fyri dómsnevnd FBF. Kæran hjá ÍF tykist ikki viðgera annað enn upphæddirnar í fíggjarligu uppgerðini í nevnda telduposti. FBF hevur víst á hetta brek í kæruni í sínum skrivum til ÍD. Vit mugu tó taka við metingina, at eisini ítóttafeløgini hava avmarkaða orku, og tí var tað ikki órímiligt, um ÍF meinti tað vera nóg mikið bert at taka fram tað í kæruni, sum FBF hevði tikið støðu til, meðan ÍF væntaði at málið alt fór at verða viðgjørt í dómsnevndini. Í framtíðini eiga feløg sjálvsagt mest møguligt íkæruskrivum at nevna øll tey kærupunkt, tey ynskja at fáa viðgjørd í dómsnevndunum. Men, bæði sersambond,

kappingarnevndir hjá sersambondum og dómsnevndir hjá sersambondum eiga at vegleiða um hetta. Kærupunkt kunnu verað tikin upp, um henda vegleiðing ikki er nøktandi.

(16) Í hesum førinum átti dómsnevnd FBF at hava kunna seg við alt málið, eisini áheitan ÍFs um at støða var tikin til nevndu prinsippiellu spurningar. Dómsnevndin skuldi tá antin havt spurt ítøkiliga, um kært var um hesar spurningar eisini ella í almennari vegleiðing at hava víst feløgunum á, at tey mugu gera greitt, hvat tey kæra um. Dómsnevndin skuldi eisini av sínum eintingum hava víst FBF á, at málið ikki var nøktandi avgreitt í FBF ella kærunevnd FBF.

(17) Vit halda tí, at dómsnevnd FBF hevur mistikið seg týðandi í málsviðgerðini.

(18) ÍD má taka støðu til, hvør fylgjan skal vera av, at vit halda týðandi mistøk verða framd. Tað liggur í øllum kæru- ella royndarskipanum, at har mannagongdirnar hjá teimum lægru stovnunum eru ónøktandi, kann royndarstovnurin – í hesum førinum Ítróttadómstólurin – velja ímillum at taka støðu sjálvur ella at lata málið ganga umaftur. Lata vit málið ganga umaftur, kann dómsnevd FBF taka støðu til alt málið av nýggjum, grundað á tey skjøl og tær grundgevingar, sum eru komin fram upprunalig og í fyrireikingini hjá ÍD og annars grundað á slíkt tilfar ella framløgur, sum dómsnevndin heldur vera neyðugar og til hjálpar. Á tann hátt verður tað innan flogbóltssambandið sjálvt, at loysnirnar finnast, tó at tann niðurstøðan eisini kann kærast til okkara innan vanliga freist.

(19) Vit kunnu vegleiða dómsnevnd FBF við at nevna, at tað er vanligt í slíkum royndarhøpi at taka við í metingina, at prinsppiel mál kunnu gerast av, so tey bert fáa týdning fyri framtíðina. Tað ber til hjá dómsnevdin at taka støðu til prinsipiellu spurningarnar, uttan tó at broyta úrslitið í einstøkum dystum, ið langt síðani eru spældir.

(20) Vit kunnu eisini leggja afturat, at sum fylgja av týðandi mistøkunum eru freistirnar suspenderaðar. Dómsnevndin skal viðgera hetta mál sum rættstundis innkomið, tá hon fær tað aftur frá okkum.

(21) Í hesum føri velja vit tí at lata málið ganga umaftur. Dómsnevnd FBF fær boð um at taka málið uppaftur.

(22) Dómur og niðurstøður sagdar í fullari semju. Málið viðgjørt skrivliga, á innanhýsis fundi, og dómur sagdur skrivliga 22. mars 2004.

Kári á Rógvi,
Fremsti Ítróttadómari